## Barnasangskeið á Strondum

Í nøkur ár hava fólk gingið og hugsað um at skipa fyri einum barnasangskeiði. Hugskotið er komið úr Danmark, har Indre Mission í fleiri ár hevur skipað fyri sang- og tónleikalegu í eina viku í summarfrítíðini. Nú er komið so væl áleiðis, at skráin byrjar at taka form. Vit fara fyrst og fremst í sirkus. Tað gera vit við einum sangleiki, sum vit venja til ta stóru framførsluna fríggjakvøldið, sigur ein av fyrireikarunum Beinta Berthelsen á Strondum. Á skránni annars verður sangur, bíbliutímar, svimjing og ymisk spøl úti og inni, góður matur og mangt annað. Barnasangskeiðið er fyri børn í skúlaaldri, og er bæði fyri dreingir og gentur. Fyrireikararnir hava funnið fram til ein spennandi sangleik, sum bæði hevur sang og leik við. Leikurin fer fram í einum sirkusi, har nøkur hava oyðilagt tað góða lagið, og er um, hvussu tey royna at bjarga tí.

## Ferðavinnudagur í oktober

Ætlanin er at stovna eitt vinnufelag fyri ferðavinnuna 31. oktober í ár. í hesum sambandi verður ein ferðavinnudagur á Hotel Føroyum frá kl 12. Dagurin er ætlaður øllum fyritøkum og øðrum, sum eru virkin innan føroysku ferðavinnuna. Væl er komið áleiðis við fyrireikingunum av ferðavinnudegnum. Dagurin byrjar á middegi við ábiti og síðani verða ymiskir fyrilestrar á skránni, millum annað fer Súsanna Sørensen frá Samvit at greiða frá marknaðarføring av Føroyum, og Oda Andreassen fer at vísa á, hvussu samstarv kann menna tilboð til ferðafólkini. Út á seinnapartin fer Magni Arge at halda fyrilestur um, hvat ferðavinnan kann brúka eitt ferðavinnufelag til, og eftir tað fer Erna Hauksdóttir frá íslendska ferðavinnufelagnum at greiða frá, hvussu tey arbeiða við at menna karmarnar fyri ferðavinnu í Íslandi, og hvussu íslendska ferðavinnan fær nyttu av felagnum. Tá fyrilestrarnar eru lidnar verður stovnandi aðalfundur av føroyska Ferðavinnufelagnum.

# á Føroyabanka



*- Vit mugu gera alt fyri at skapa umstøður, so Føroyabanki kann mennast aftur og áhaldandi geva eitt munagott íkast til føroyska vinnu og harvið samfelagið sum heild, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður*

er hetta ein neyðug avgerð, sum í seinna enda fer at vísa seg at verða til fyrimuns bæði fyri stovn og fyri fiskivinnu.

Landsstýrismaðurin heldur tað vera høpisleyst at tvíhalda um ein fiskiskap eftir einum fiskastovni, sum er komin á gravarbakkan.

- Vit skulu hinvegin gera alt fyri at skapa umstøður, so Føroyabanki kann mennast aftur og áhaldandi geva eitt munagott íkast til føroyska vinnu og harvið samfelagið sum heild.

At enda sigur landsstýrismaðurin, at søgan um toskastovnin á Grand Bank ræðir.

- Tí er henda avgerðin tikin, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður.





*Eyðstein Djurhuus, formaður í FSN, Sjúrður Heinesen, virðislønarvinnari og Páll Heinesen, formaður í Maskinmeistarafelagnum*

# Navigatørar og maskinmenn fáa egið felagsblað

**Blaðið, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið fara at geva út í felag, fær navnið Mið & Magn. Sjúrður Heinesen vann kappingina um blaðnavnið og fekk tær 15.000 krónurnar, sum vóru virðislønin fyri besta uppskotið**

BLAÐÚTGÁVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í summar samtyktu Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið at fara undir felags blaðútgávu.

Í sambandi við útgávuna skipaðu feløgini fyri kapping, sum hevði til endamáls at finna blaðnum eitt hóskandi navn, sum kann umboða samleikan hjá báðum feløgunum.

Freistin at koma við uppskotum var úti 18. august, og tá høvdu feløgini fingið tilsamans 18 uppskot.

Feløgini siga, at fleiri av uppskotunum vóru góð, men best dámdi teimum uppskotið hjá Sjúrða Heinesen, sum soleiðis fekk virðislønina á 15.000 krónur fyri navnið Mið & Magn.

- Talan er um tvey ymisk yrki, sum feløgini umboða, og eg havi roynt at finna eitt heiti fyri hvørt yrki og havi síðan sett tey saman.

Sjúrður Heinesen sigur við heimasíðuna hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag, at nógv ymisk heiti kundu verið til eitt slíkt felagsblað, men at hann í leitanini eftir rætta navninum eisini hevur roynt at funnið orð, sum eru løtt at siga.

### Betri umboðan

Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sigur, at enn er alt ikki komið endaliga upp á pláss við nýggja felagsblaðnum, men gongst sum ætlað verður fyrsta útgávan í hesum árinum.

- Ætlanin er, at Mið & Magn skal koma út einar fýra ferðir um árið og blaðið, sum helst verður í A4 støðd, fer í fyrsta lagi at viðgera fakfelagsviðurskifti, sum hava við virkisøkið hjá báðum feløgunum at gera.

Formaðurin í FNS heldur, at hetta er eitt økið, sum verandi fjølmiðlar gera ov lítið burtur úr.

- Onkur fer at hava innihaldsligu ábyrgdina av blaðnum, og teknisku ábyrgdini fer Snæbjørn í Dali at taka sær av.

Snæbjørn tekur sær framманundan av heimasíðuni hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag www.fsn.fo, eins og hann tekur sær av bløðum hjá onkrum øðrum feløgum eisini.

### Útbreiðslan

- Ætlanin er ikki, at vit, sum umboða FSN og Maskinmeistarafelagið, skulu vera bundin av at útvega regluligt tilfar til blaðið, men vit fara kortini at lýsa sjónarmið, sum feløgini hava til ymisk mál, sum eru frammi.

Umframt at viðgera fakfelagsviðurskifti innan virkisøkið hjá báðum feløgunum, sigur Eyðstein Djurhuus, at ætlanin eisini er at kunna um ymisk viðurskifti uttan úr heimi.

- Ætlanin er, at limirnir í feløgunum skulu fáa blaðið, eins og innihaldið ætlandi fer at liggja á heimasíðuni hjá feløgunum. Hvussu útbreiðslan annars verður, hava vit ikki tikið endaliga støðu til enn, sigur formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag.